# DROYMIR TÚ UM AT ARBEIÐA SUM MIÐLAGRAFIKARI?

**Føroyaprent søkir miðlagrafikaralærling**
Droymir tú um at arbeiða innan grafiska økið, er lærupláss sum miðlagrafikari nakað fyri teg. Tær dámar at gera eitt arbeiði við stórum neyvleika og høgari góðsku, og tú trívist at arbeiða við tíðarfreistum.

Við eini útbúgving sum miðlagrafikari fært tú førleika, vitan og royndir, sum geva nógvar møguleikar, bæði á arbeiðsmarknaðinum og til víðari útbúgving. Sum miðlagrafikaralærlingur lærir tú at brúka tíni kreativu evni, saman við nógvum tekniskum snildum. Tú arbeiðir bæði við at menna hugskot, sniðgevur hesi, og sendir hesi víðari til aðrar framleiðslur. Men tú lærir eisini nógv um teg sjálvan, og hvussu tú skalt fyrihalda teg til tað fakliga, til arbeiðsplássið og til starvsfelagarnar.

**Útbúgvingin bjóðar annað enn drúgvar bøkur og tímalangar undirvísingardagar**
Sum lærlingur á Føroyaprent sleppur tú beinanvegin at royna teg í einum livandi arbeiðslívi við ábyrgd. Tú ert undir útbúgving, men eisini longu í ferð við at fáa tær arbeiðsroyndir á størstu grafisku fyritøku í landinum.

*Vilt tú vita meira far inn á heimasíðu okkara www.foroyaprent.fo/net*
*Umsókn við CV skal verða okkum í hendi seinast 15. sept. 2008.*

Føroyaprent
Hoyvíksvegur 59 · Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel. 31 45 55 · fax 31 80 26 · info@foroyaprent.fo



# Skrivstovufólk til PAM Offshore Service

Á skrivstovuni hjá PAM Offshore Service er eitt skrivstovustarv - 1/2 til 3/4 tíð - leyst at søkja.

PAM, ið er dótturfelag hjá Skipasmiðjuni, arbeiðir við at leiga út arbeiðsmegi, einamest í Noreg. Í løtuni starvast millum 40-50 fólk hjá felagnum.

Arbeiðsuppgávurnar eru umframt vanligt skrivstovuarbeiði, logistikk uppgávur og bókhald.

Ynskjandi er, at tú hevur kunnleika til skandinavisk mál eins og til eingilskt. Teldukunnleiki á brúkarastigi er neyðugur.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju
Postboks 65
110 Tórshavn

og verða okkum í hendi í seinasta lagi 8. september 2008.

Nærri upplýsingar fáast hjá Anju Jacobsen, dagliga leiðara, á telefon +298 79 11 39, anja.jacobsen@faroeyard.fo ella hjá Tummasi Nielsen, fíggjarleiðara, á telefon +298 791122

SKIPASMIÐJAN
Tórshavnar Skipasmiðja
J.C. Svabosgøta 31
P.O. Box 65
FO-110 Tórshavn
Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo



Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · tel: 588880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo

# Fólk søkist til verkstaðið

**Vegna økt virksemi søkir Bilrøkt eftir fólki at arbeiða á verkstaðnum.**

**Starvið fevnir um:**
Reingerð av akførum v.m.

**Førleikakrøv:**
Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva.
Skal vera kundavinarlig/-ur og hava góðan røkjuskap. Koyrikort krevst.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi arbeiðspláss í menning. Løn eftir avtalu.

**Bilrøkt**
Ivaleyst størsta arbeiðsøkið hjá Bilrøkt er bilvask. Tað var eisini júst bilvask, ið var grundarlagið undir fyritøkuni, tá ið Bilrøkt bleiv sett á stovn.

Bilrøkt er eisini farið undir at hava bilverkstað, sum ger smærri uppgávur.

Vit skifta bremsur, útstoyt o.a.
Eisini hava vit nýmótans dekk- og avbalanseringmaskinur.

Bilrøkt hevur í dag 3 flutningsbilar sum eru standby 24 tímar um døgnið, at hjálpa kundum, sum eru komnir illa fyri við bili sínum.

Eitt stórt virkisøki hjá Bilrøkt í dag eru leigubilarnir. Bilrøkt hevur lagt seg eftir at hava góðar og bíligar leigubilar, har kundin kennir seg tryggan við bilin.

Bilrøkt selur eisini brúktar bilar hjá sær sjálvum og fyri kundar.

BILRØKT
*Borgar fyri góðsku...*




# SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir málsviðgera til Akstovuna at byrja skjótast til ber. Talan er um parttíðarstarv.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir m.a. um:

· Telefonavgreiðslu
· Avgreiðslu av viðskiftafólki
· Sýnsumsiting

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella samsvarandi lærdómi og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi og tænastuhugaður. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**UMSÓKNIR**
Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 2. september 2008.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Búgva Apol, deildarleiðara, á telefon 350 400.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið.*

*Á Akstovuni starvast 21 fólk.*

SENDISTOVAN

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo